# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Tórálvur Skaalum** í Sørvági andaðist í heiminum leygarkvøldið 47 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin klokkan 14. Tey ið vilja minnast Tórálv, kunnu lata Kristnastovu í Keypmannahavn eina peningagávu.

**Henny Elisabeth Vágsheyg Valkvæ,** fødd í Klaksvík, búsitandi á Godoy í Noreg, andaðist sunnudagin 72 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13.

**Tove Petersen** á Argjum, andaðist sunnudagin, 77 ára gomul. Bønarhald verður í Vesturkirkjuni mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Tove, kunna lata lata Sambýlinum á Mýrini í Hoyvík eina gávu. Konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum mongu, sum sýndu samkenslu og sera stórt hjálpsemi, tá kæri maður mín, pápi, abbi og verfaðir okkara

**Virgar Frýdal**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

*Familjunnar vegna*
**Hilda Frýdal**

## Tøkk

Eg takki tykkum hjartaliga sum sýndu samkenslu, tá kæri elskaði drongur mín

**Ragnar Anthoniussen**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri kransar og blómur.
Og stóra tøkk til sjúkrahúsprestin, læknar, sjúkrasystrar og ambulansafólkið fyri alla ta troyst tey góvu okkum, tá ið eg og Marita vóru um hann, tá ið hann var í Esbjerg.
Eg takki hjartaliga.

*Vegna tey avvarðandi*
**Joan, Birgit, Marita, Kris, Bjørk og Mariah**

**Dagurin**
**19. september. Constantia**. Kom upp í álmanakkan frá árinum 1700, men vit vita ikki, hvønn sipað verður til.

# Páll Arge aftur í Føroyum

**Tað var ikki bert Bellamy Brothers, ið borðreiddu við nostalgi á kovboytiltøkunum á Hálsi og á Tvøroyri um vikuskiftið, eftir sjey ár í útlegd traðkaði fyrrverandi Mr. Showbusiness, Páll Arge á føroyskan pall**

**NØVN**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Hann var ikki eldur ein dag, og enn í t-troyggju við avkubbaðum ermum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Páll Arge var í 80'árunum og 90'árunum, Mr. Showbusiness í Føroyum. Hann stóð fyri flest øllum størri tónleikatiltøkum í hesum tíðarskeiði, men knappiliga hvarv henda býarmyndin. Ein av konsertunum, ið Páll Arge skipaði fyri, var konsertin við Bellamy Brothers fyrru ferð bólkurin vitjaði. Í sambandi við, at bólkurin nú aftur kom til landið, høvdu fyrireikararnir fingið Páll Arge aftur til Føroya at virka sum frásøgumann. So líka knappiliga sum hann hvarv, stóð Páll Arge aftur á føroyskari grund, sjey ár síðan hann seinast var á klettunum.

Ílatin svarta t-troyggju uttan ermur og ikki eldur ein dag, traðkaði Páll Arge á pallin í Høllini á Hálsi, sum hann hevur gjørt so ofta áður. Tað fór eitt suð gjøgnum fjøldina, og á onkran hátt tyktist, sum at verða kastaður tíggju ár aftur í tíðina. Men tað tyktist so sera hóskandi, nú talan var um nostalgi tónleik, sum tann hjá Bellamy Brothers.

# Hornorkestur á vitjan



*Í vikuni kemur hornorkestið OSLO 3. korps á vitjan í Føroyum*

Í døgunum 20. - 23. september 2007 kemur norska hornorkestið OSLO 3. korps á føroyavitjan. Talan er um eitt av mongu hornorkestunum hjá Frelsunarherinum í Noregi. Orkestrið vitjar Hornorkestur Frelsunarherins í Tórshavn. Samstarvið kom í lag, eftir at hornorkestrini spældu saman í Íslandi á sumri 2004.

Í ferðalagnum verða 33 fólk, herav 25 hornspælarar. Leiðari og dirigentur hjá Oslo 3. korps hornorkestri er Mattias Wallin. Hornorkestrið hevur eitt spennandi program, ið fevnir um marchir, solo'ir og eisini einum manskóri.

Við á ferðini eru fleiri leiðarar í Frelsunarherinum í Noreg, og her millum eisini kommandør Thorleif Gulliksen, ið áður hevur verið leiðari fyri Frelsunarherin í Europa. Herumframt er ein svenskur euphoniumspælari, Michael Ljungholm, ið fer at spæla solo á konsertunum. Ferðin til Føroyar er stuðlað av Norðisk Ministerráð.

**Konsertir**

Í sambandi við vitjanina verður skipað fyri felagsvenjingog felagskonsert. Fríggjadagin 21. september kl. 19.30 verður konsert í Christianskirkjuni í Klaksvík. Umframt Oslo 3. korps hornorkestur luttaka hornspælarar og sangarar úr Frelsunarherinum í Tórshavn. Hornorkestrini fara eisini at spæla tvey felagsløg.

Leygardagin kl. 13.30 spælir Oslo 3. korps á torginum í SMS. Um viðrar verður gingið í skrúðgongu niðan á trapputrøðna. Leygarkvøldið kl. 19.30 er konsert í Frelsunarherinum, Tórsgøta 19. Sunnumorgunin kl. 11 luttekur orkestrið á møtinum hjá Frelsunarherinum í Tórshavn, tá sang og musik guðstænasta er á skránni.

Ferðalagið fer avstað aftur seinapartin sunnudagin. Tiltøkini eru ókeypis og øll eru vælkomin at lurta.